# Avtala um felags lønarkarm við 12 fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum

Partarnir eru samdir um, at lønarkarmurin eigur at taka støði í *Tilmæli um lønarkarm, 6. nov. 2025*, ið eigur at vera tað berandi grundarlagið fyri karminum.

## Høvuðsgrundarlagið fyri karminum

### 1. Karmur við støði í tilmælinum frá arbeiðsbólkinum

Arbeiðsbólkurin mælti til, at lønarvøksturin eigur at taka støði í produktivitetsvøkstrinum og prístalinum:

- Produktivitetsvøksturin seinastu 5 árini fyri at tryggjað, at lønarhækkingarnar eru kjølfestar í einari varandi hækking í produktivitetinum, og at talan ikki bara er um fyribils sveiggj.
- Harafturat eru partarnir samdir um, at lønarvøksturin eigur at taka støði í prísvøkstrinum seinastu 3 árini. Orsøkin til styttra tíðarskeiðið er, at príshækkingar í einum einstøkum ári ávirka lønina í størri mun enn produktivitetshækkingar. Prísvøkstur má tí kompenserast skjótari enn produktivitetsvøkstur.

Um einans miðal produktivitetsvøksturin seinastu 5 árini og prísvøksturin seinastu 3 árini verða nýtt, kunnu ávísar gongdir í búskapinum føra til neilig úrslit, sum frymilin ikki tekur hædd fyri. Tí eru partarnir samdir um, at avtalan um felags karm víkur frá tilmælinum, sum nærri ásett í pkt. 2 og 3.

## Aðrar tillagingar í mun til framtíðarútlit o.a.

### 2. Lønarvøkstur í privata geiranum

Partarnir avtala við hesum, at karmurin fyri almenna arbeiðsmarknaðin skal tillagast í mun til privata arbeiðsmarknaðin[1] hvørt ár frá 1. okt. 2026. Tillagingin verður vektað 75% 1. okt. 2026 til 30. sept. 2027 og 50% frá 1. oktober 2027. Sí *dømi 1* í fylgiskjali 3.

### 3. Stór sveiggj

Stór sveiggj í búskapinum einstøk ár kunnu gera, at ótilætlaður munur verður millum karmin, sum verður avtalaður á privata arbeiðsmarknaðinum og á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Partarnir avtala við hesum, at munurin á karminum, sum verður avtalaður á almenna arbeiðsmarknaðinum sambært hesi avtalu, í mesta lagi kann vera 0,8% stig lægri ella hægri enn karmurin, sum frammanundan er avtalaður á privata arbeiðsmarknaðinum. Sí *dømi 2* í fylgiskjali 3.

---

[1] Karmurin sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, sum vanliga verður avtalaður 1. mai.

## Aðrar fortreytir fyri avtaluni

**4. Menna hagtøl og háttalag**

Arbeiðsbólkurin hevur víst á, at stórar avmarkingar eru í tøka hagtalsgrundarlagnum innan arbeiðsmarknaðin, m.a. eru ikki neyv tøl fyri tímaproduktivitetin í Føroyum. Somuleiðis vísir arbeiðsbólkurin á, at eingi almenn vísitøl eru fyri lønarlagið í almenna og privata geiranum. Partarnir eru samdir um at raðfesta framleiðslu av betri hagtølum at nýta til komandi lønarsamráðingar.

**5. Lønarkarmurin frá 1. oktober 2025 til 30. september 2026**

Arbeiðsbólkurin hevur mælt til at nýta karmin á privata arbeiðsmarknaðinum fyri 2025 í sínum tilmæli til lønarkarm í almenna geiranum 1. oktober 2025 til 30. september 2026.

Tilmælið frá arbeiðsbólkinum hevur sum fortreyt, at valdi leisturin, har ávikavist 5 ára miðal produktivitetur og 3 ára miðal prísvøkstur, sum frá líður gevur sama úrslit, sum fyri privata arbeiðsmarknaðin og tryggjar, at reallønin sum frálíður fylgir gongdini í produktivitetinum. Fortreytin fyri hesum er, at partarnir binda seg til at nýta valda leistin, við avtalaðum tillagingum, í eitt longri tíðarskeið. Møguligar óvissur, tongdar at tí ári byrjað verður, missa týdning yvir tíð.

Partarnir eru samdir um, at lønarkarmurin fyri tíðarskeiðið 1. oktober 2025 til 30. september 2026 er 3,87%.

**6. Lønarkarmurin frá 1. oktober 2026**

Lønarkarmurin fyri 1. oktober 2026 til 30. september 2027 tekur støði í tilmælinum hjá arbeiðsbólkinum við hesi tillaging:

Miðal produktivitetsvøksturin seinastu 5 árini, t.v.s. 2021-2025. Miðal prísvøksturin seinastu 3 árini, t.v.s. august 2023 til august 2026 .

Lønarkarmurin fyri 1. oktober 2026 til 30. september 2027 verður ásettur, tá tølini fyri produktivitetsvøksturin í 2025 eru tøk, t.v.s. fyrst í oktober 2026.

Lønarkarmurin verður tillagaður í mun til privata arbeiðsmarknaðin hvørt ár. Sí punkt 2 omanfyri og *dømi 1* í fylgiskjali 3.

Lønarkarmurin frá 1. oktober 2027 og til avtalan fer úr gildi verður ásettur á hvørjum ári eftir sama leisti.

## 7. Stilling

Partarnir kunnu seta fram áheitan um stilling av løn hjá starvsbólki.

Slík stilling av lønini kann bert fremjast, um mett verður,

1) at starvsbólkurin, uttanrímliga orsøk, er afturúrsigldur samanborið við aðrar líknandi bólkar, ella
2) um viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum gera, at neyðugt er at gera broytingar í verandi lønarbygnaði.

Áheitan um lønarstilling eftir hesi avtalu kann í fyrsta lagi verða sett fram 1. oktober 2027.

Sum bólkur í hesum samanhangi er at skilja persónar, sum útinna ávísar funktiónir, ella virka undir ávísum treytum, sum eru felags fyri hesar persónar.

Verður áheitan um stilling av lønarbygnaðinum sett fram, verður nevnd sett at greina lønarviðurskiftini. Nevndin verður umboðað av fakfólki frá fakfeløgunum og frá almennu arbeiðsgevarunum. Nevndin ger tilmæli til møguligar broytingar í seinasta lagi eitt ár eftir, at áheitan er sett fram.

Seta fleiri fakfeløg fram áheitan um stilling av lønarbygnaðinum, viðger nevndin hesar undir einum. Eitt ára freistin verður roknað frá tí degi, seinasta áheitanin er sett fram.

Tilmælið verður tikið við í komandi sáttmálasamráðingarnar, tó í fyrsta lagi 1. oktober 2028.

Nærri avtala verður gjørd millum partarnar um skipan av nevnd, tal av limum, tíðarfreistir, krøv til áheitan um stilling av lønarbygnaðinum o.a.

*Fortreytir*
Partarnir eru samdir um, at tað er ein fortreyt fyri hesi avtalu, at hægri karmur bert kann avtalast við onnur fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum, um omanfyri nevndu treytir 1) og 2) eru loknar og grundgeving við nøktandi útrokningum fyriliggur.

## 8. Gerðarættur

Allar trætur og ósemjur um hesa avtalu eru fevndar av fasta gerðarætti.

## 9. Gildi sáttmálans

Hesin sáttmáli fær gildi tann 1. oktober 2025.

Friðarskylda er, meðan sáttmálin er í gildi. Friðarskyldan fevnir um øll viðurskifti í hesi avtalu, harundir øllum lutum í karminum sambært fylgiskjali 2.

Sáttmálin kann sigast upp við 1 ára freist, tó í fyrsta lagi tann 30. september 2029.

Tórshavn, tann 5. februar 2026

Starvsfelagið
**Súni Selfoss**

Heilsurøktarafelagið
**Bingerð H. Fosságil**

Ljósmøðrafelag Føroya
**Silja í Líða**

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
**Hannus Petersen**

Yrkisfelagið Miðnám
**Maria Chun Nielsdóttir**

Akademikarafelag Føroya
**Arni Petersen**

Farmakonomforeningen
**Ann-Mari Grønbæk**

Yngri læknar Føroyar
**Aksel Kambsskarð Berg**

Kost- og Føðslufelagið
**Poula Patursson**

Fysioterapeutfelag Føroya
**Annika Osvaldsdóttir Sørensen**

Føroya Tekniska Lærarafelag
**Sjúrður Sólstein**

Pharma Danmark
**Stine Hasling Mogensen**

**Fyri Fíggjarmálaráðið**

Ruth Vang, landsstýriskvinna

Jan Sjóstein, lønarstjóri

**Fylgiskjal 1**

# Bakstøði

Á fundi 9. oktober 2025 millum Starvsfelagið, Akademikarafelag Føroya, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Yrkisfelagið Miðnám, Farmakonomar og Kost- og Føðslufelagið (hereftir nevnd fakfeløgini) og Kommunala arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið varð avtalað at seta ein arbeiðsbólk at gera tilmæli til felags karm.

*Arbeiðsetningur:*

Endamálið er at áseta ein felags lønarkarm, sum verður ásettur við støði í hesum viðurskiftum:

1. Lønarvøkstrinum í privata geiranum
2. Onnur viðurskifti, herundir t.d. produktivitetsvøkstur, sum arbeiðsbólkurin metir eru fakliga viðkomandi

Ásannandi at vit ikki hava neyv tøl fyri eitt nú produktivitetsvøkstrinum í Føroyum, eru partarnir samdir um at áseta karmin so neyvt og rætt sum til ber við nevndu viðurskiftum fyri eyga.

Endamálið er røkka einum støðugum reallønarvøkstri, sum er búskaparliga forsvarligur.

*Frágreiðing frá arbeiðsbólkinum 6. november 2025*

Ein samdur arbeiðsbólkur mælti til at nýta miðal produktivitetsvøksturin undanfarnu 5 árini og miðal prísvøkstur 3 ár aftur roknað frá august 2025.

Miðal produktivitetsvøkstur 2020-2024 er 1,42%, og miðal prísvøkstur august 2022 til august 2025 er 2,17%. Tilsamans gevur hetta 3,59%, um gongdin seinastu árini skal nýtast sum grundarlag fyri lønarkarminum fyri næstu 2 árini.

*Samráðingar um lønarkarm við 12 fakfeløg*

Eftir at farið var undir arbeiðið at fyrireika samráðingar hava hesi fakfeløg valt at vera við í samráðingunum um felags lønarkarm:

Starvsfelagið, Akademikarafelag Føroya, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Yrkisfelagið Miðnám, Farmakonomar, Kost- og Føðslufelagið, Yngri læknar Føroyar, Heilsurøktarafelagið, Føroyskir Fysioterapeutar, Føroya Tekniska Lærarafelag, Ljósmøðrafelag Føroya og Pharma Danmark (hereftir nevnd fakfeløgini)

# Lýsing av lutum í lønarkarminum

**Allýsing av felags lønarkarmi:**

Fíggjarligi karmurin fyri sáttmálasamráðingar er at skilja sum tann samlaði kostnaðurin fyri vøksturin í lønarútreiðslunum í tí sáttmálaskeiði, ið samráðst verður um.

Samanumtikið fevnir lønarkarmurin um:

1. øll tey viðurskifti í eini semju, sum økja lønarútreiðslurnar fyri sáttmálaskeiðið, ið samráðst verður um.

2. væntaðar lønarhækkanir, ið annars fara fram í sáttmálaskeiðinum, uttan at hetta er avtalað í semjuni.

**Ad. 1 – viðurskifti, ið eru partur av eini semju**

Við viðurskifti avtalað í eini semju meinast í høvuðsheitum við hækkingar í øllum lønarsløgum, eitt nú:

- grundløn
- eftirløn
- gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð
- øllum viðbótum: fyri eitt nú førleikaviðbót, funktiónsviðbót o.s.fr.

Broytingar í frítíð, arbeiðstíð og øðrum viðurskiftum, ið somuleiðis økja um lønarútreiðslurnar, eru eisini partur av lønarkarminum.

**Ad. 2. – væntaðar lønarhækkanir**

Við væntaðar lønarhækkanir, ið fara fram í sáttmálaskeiðinum og skulu takast av karminum, men ikki eru partur av einum semjuteksti, meinast við lønarhækkanir, sum skyldast:

- umflokkingar, ið verða framdar í sáttmálaskeiðinum
- játtan av ymiskum viðbótum í sáttmálaskeiðinum

Partarnir avtala, at ein arbeiðsbólkur verður settur at greina hetta nærri í komandi sáttmálaskeiði.

Arbeiðssetningurin verður hesin:

- Partarnir orða avtalu um, hvørjir partar av hesi lønarhækkan skulu telja við í karminum
- Partarnir avtala roknihátt og hvussu hesar útreiðslur skulu ávirka karmin

Arbeiðsbólkurin skal verða liðugur við hetta arbeiðið í seinasta lagi 1. september 2026.

Partarnir eru somuleiðis samdir um, at møguligar lønarhækkanir út yvir avtalaða karmin í tíðarskeiðinum frá 1. oktober 2025 til 30. september 2026 fara at hava ávirkan á karmin hjá einstøku feløgunum, tá karmurin fyri tíðarskeiðið 1. oktober 2026 til 30. september 2027 verður ásettur.

Orsøkin til at vit ikki byrja uppá skipanina í mun minking av karminum vegna lønarhækkanir, ið liggja uttan fyri avtalaða karmin er, at karmurin fyri tíðarskeiðið 1. oktober 2025 – 1. oktober 2026 er ásettur á annan hátt, enn hann verður ásettur frameftir.

# Dømi um tillaging til karmin á privata arbeiðsmarknaðinum

Er karmurin, sum verður avtalaður á privata arbeiðsmarknaðinum 1. mai, lægri ella hægri enn avtalaði karmurin á almenna arbeiðsmarknaðinum fyri tíðarskeiðið 1. oktober til 30 september árið eftir, verður karmurin fyri almenna arbeiðsmarknaðin tillagaður við tí avtalaða prosentinum . Sí dømi niðanfyri:

*Dømi 1 um tillaging:*

| Felags lønarkarmur fyri almenn fakfeløg | Roknaður karmur | Tillaging % | Tillaging av karminum | Avtalaði karmurin | Privati arbeiðsmarknaðurin | Karmur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. okt. 25 til 30. sept. 26 | 3,87% | | - | - | 1. mai 26 til 30. apríl 27. | 3,00% |
| 1. okt. 26 til 30. sept. 27 | 3,10% | 75% | -0,08% | 3,03% | 1. mai 27 til 30. apríl 28. | 3,00% |
| 1. okt. 27 til 30. sept. 28 | 2,62% | 50% | 0,19% | 2,81% | 1. mai 28 til 30. apríl 29. | 3,00% |
| 1. okt. 28 til 30. sept. 29 | 3,25% | 50% | -0,13% | 3,13% | 1. mai 29 til 30. apríl 30. | - |
| 1. okt. 29 til 30. sept. 30 | | | -0,01% | **8,96%** | Tils. 3 ár (umleið) | **9,00%** |

*(Tølini eru avrundað)*

*Frágreiðing til dømi:*
Í døminum verður avtalaði karmur á privata arbeiðsmarknaðinum fyri tíðarskeiðið 1. mai 2026 til 30. apríl 2027 ásettur til 3%. Miðal produktivitetsvøksturin fyri 2021-2025 og miðal prísvøkstur 3 ár aftur, roknað frá august 2026, er í døminum 3,1% (talið er tøkt í oktober 2026).

Munurin millum karmin á privata arbeiðsmarknaðinum og roknaða karmin fyri almennu fakfeløgini er í hesum føri 0,10%. Munurin verður tillagaður við 75%, ið svarar til 0,08%. Avtalaði karmurin verður 3,03%.

*Dømi 2 um stór sveiggj:*

| Felags lønarkarmur fyri almenn fakfeløg | Roknaður karmur | Tillaging % | Tillaging av karminum | Avtalaði karmurin | Privati arbeiðsmarknaðurin | Karmur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. okt. 25 til 30. sept. 26 | 3,87% | | - | - | 1. mai 26 til 30. apríl 27. | 3,00% |
| 1. okt. 26 til 30. sept. 27 | 3,10% | 75% | -0,08% | 3,03% | 1. mai 27 til 30. apríl 28. | 3,00% |
| 1. okt. 27 til 30. sept. 28 | 5,29% | 50% | -1,14% | 3,80% | 1. mai 28 til 30. apríl 29. | 4,50% |
| 1. okt. 28 til 30. sept. 29 | 3,60% | 50% | 0,45% | 4,05% | 1. mai 29 til 30. apríl 30. | - |
| 1. okt. 29 til 30. sept. 30 | | | -0,77% | **10,87%** | Tils. 3 ár (umleið) | **10,50%** |

*(Tølini eru avrundað)*

*Frágreiðing til dømi:*
Í døminum verður roknað við óvanliga høgum prísvøkstri í 2027, sum ger, at roknaði karmurin fyri tíðarskeiðið 1. oktober 2027 til 30. september 2028 verður 5,29%. Aftaná tillaging til lønina á privata arbeiðsmarknaðinum – t.v.s. 50% x (5,29% - og 3%) - er karmurin 4,14%. Tað er í hesum føri meira enn 0,80% stig hægri enn karmurin á privata arbeiðsmarknaðinum, og tí verður avtalaði karmurin 3,80% fyri tíðarskeiðið 1. oktober 2027 til 30. september 2028.